# Musikk-video við føroyskum dansi



**Upptøkurnar til nýggja filmin hjá Katrini Ottarsdóttir komu í kassan mikukvøldið. Upp á fimm minuttir ætlar hon at lýsa sálina í føroyskum dansi, og filmurin verður vístur í øllum Norðurlondum næsta ár**

SJÓNVARPSFILMUR
*Magnus Dam*

"Grani bar gullið av heiði, brá hann sínum brandi av vreiði. Sjúrður vá á orminum. Grani bar gullið av heiði. "

Teir 35 dansararnir í Fótatraðki, dansifelagnum í Keypmannahavn, endurtaka niðurlagið á Regini smiði fyri Gud viti hvørju ferð. Týskvøldið kvóðu tey sama kvæði í umleið fýra tímar. Klokkan er nú níggju kvøldið eftir, og tey koma helst at kvøða einar tveir tímar afturat, áðrenn Katrin Ottarsdóttir er nøgd. Áðrenn hon hevur fingið allar upptøkurnar í kassan, og eingir lepar hanga eftir.

At gera film er ikki løtuverk. Heldur ikki, tá talan er um ein stuttfilm, har leikararnir einki annað skulu gera enn kvøða fyrstu 12-13 ørindini av Regini smiði. Tað tekur tíð at fáa allar vinklar lýstar við upptøkutólinum. Hvørt eitt andlitsbrá, nærmyndir, hendurnar, sum vagga aftur og fram, og føturnar, sum trampa í gólvið. Tvey fram, eitt aftur.

So er steðgur einaferð enn. Leikararnir leska sær á ølina ella sodavatnina, og Hugin Eide, hjálparleikstjóri og maður Katrina Ottarsdóttir, skeinkir enn ein snaps.

- Nú fara vit at taka myndir inni í ringinum, sigur leikstjórin, og Fótatraðk fer aftur upp á gólv. Dansurin fer í gongd, og sama kvæði rungar einaferð enn í náttklubbanum Park á Østerbro, sum filmsliðið hevur leigað í tveir dagar. Jú, nú gongur dansurin betri.



*Katrin Ottarsdóttir leggur dansarunum í Fótatraðki lag á, áðrenn upptøkurnar byrja*

### Og dansurin gongur

Arbeiðsheitið á nýggjasta filminum hjá Katrini Ottarsdóttir er "Og dansen går". Hetta er ikki ein filmur um føroyskan dans, men ein stuttfilmur við føroyskum dansi, greiðir Hugin Eide frá.

- Her eru eingir føroyskir búnar og eingin vøkur føroysk náttúra. Vit vilja vísa dansin og fólkini, sum kvøða, og orkuna, tey leggja í dansin. Lýsa sálina í dansinum og gera tað spennandi at hyggja at, sigur hann.

Hóast leikstjórin er føroyingur, og hóast evnið er so føroyskt sum føroyskur dansur, og tað eru føroyingar, sum kvøða, so er í veruleikanum ikki talan um ein føroyskan film. Filmurin er partur av eini størri norðurlendskari verkætlan, og hann er eitt av tveimum donskum ískoytum til verkætlanina.

Tað er ein felagsskapur, sum kallast Nordic Dance for Film, sum skipar fyri filmsætlanini. Í vár skipaði felagsskapurin fyri einari kapping, har hann royndi at finna fram til bestu uppskotini um stuttfilmar, ið snúgva seg um dans.

Katrin Ottarsdóttir, sum longu tá hevði ætlanir um at gera ein film um føroyska dansin, sendi dómsnevndini eitt uppskot. Tað sama gjørdu 120 onnur, og í fyrsta umfari vórðu 100 teirra lúkað burtur. Eftir vóru nú 20 uppskot, og millum hesi valdi dómsnevndin tey tíggju, ið henni dámdi best. Uppskotið hjá Katrini Ottarsdóttir var eitt av teimum, sum slapp allan vegin gjøgnum nálareygað.

### Vísast í øllum Norðurlondum

Tað serstaka við filmsætlanini er fyri tað fyrsta, at talan er um tíggju stuttfilmar, sum allir snúgva seg um dans av ymsum slag. Modernaðan dans, ballet, føroyskan dans og annað. Tveir filmar verða gjørdir í hvørjum av teimum fimm stóru Norðurlondunum, og longu áðrenn filmarnir eru lidnir, er vist, at teir allir verða vístir í sjónvarpinum í øllum Norðurlondunum. Tað er eisini rættiliga serstakt, vísir leikstjórin á.

- Á henda hátt skalt tú ikki gjøgnum tann strævnasta partin í eini filmsætlan, nevniliga at finna fígging, áðrenn upptøkurnar byrja, og ein keypara til filmin, tá hann er liðugur. Hetta er alt greitt frammanundan, og tað er ein stórur lætti, sigur Katrin Ottarsdóttir, sum hevur fingið 450.000 krónur at gera filmin fyri.

Almennu sjónvarpsstøðirnar fíggja verkætlanini saman við almennu filmsstovnunum, Norðurlendska Mentanargrunninum og øðrum norðurlendskum stovnum og grunnum.

### Regin Smiður rætta kvæðið

Leikstjórin var ongantíð í iva um, at hon ætlaði at brúka Regin smið í filminum. Lagið er gott og væl dámt, og kvæðið hevur eina góða rytmu, sigur leikstjórin.

Hon hevur sæð fyrstu upptøkurnar, sum vórðu gjørdar týskvøldið, og hon er væl nøgd higartil. Tað riggar væl.

- Eg vænti tað verður gott. Tað verður ein øðrvísi musikkvideo - nakað, sum fólk ikki hava sæð áður og slettis ikki eru von við uttanfyri Føroyar.

Á einum lítlum skermi í einum horni sær Katrin Ottarsdóttir alt, sum upptøkutólið tekur upp. Vinklarnir eru ofta skeivir. Upptøkutólið stendur ikki á nøkrum stativi, og fotografurin gongur aftur og fram á dansigólvinum. Fylgir stevinum. Eina løtu gongur hann inni í ringinum við upptøkutólinum beint upp í andlitið á skiparanum, og stutt aftaná liggur hann á gólvinum og tekur myndir av beinunum. Ljóðmaðurin er alla tíðina beint í hølunum. Ljóð og myndir skulu fylgast at alla tíðina.



*Fotografurin fylgir hvørjari rørslu hjá kvøðarunum, sum noyðast at kvøða somu 12-13 ørindini av Regini smiði um aftur og um aftur*

### Strævið men stuttligt

Hóast myndamaðurin er nærgangandi, og upptøkurnar mugu gerast um aftur og um aftur, so sleppa leikararnir ikki endanum. Teir leggja líka nógv fyri hvørja ferð, og meira teir sveitta og reyðari teir verða í andlitinum, væl nøgdari gerst leikstjórin.

Tað er strævið, men limirnir í Fótatraðki fáa eina uppliving, sum er fáum unt, og tað dámar teimum væl. Tey eru filmsstjørnur eina løtu, og hóast leikstjórin krevur sítt, so fáa tey eisini løn fyri stríðið. Har er ov mikið av breyði við góðum føroyskum viðskera, kaffi og te, sodavatn og øl og snapsur.

Meðan leikararnir skulu stríðast á gólvinum í einar tíggju tímar, so er filmurin ikki liðugur, hóast allar upptøkurnar komu í kassan mikukvøldið.

Tað stóra arbeiðið liggur nú fyri framman hjá leikstjóranum. Hon skal finna tey bestu brotini burturúr, tær bestu myndirnar og tað besta ljóðið. Fleiri tímar við ráfilmi skulu klippast niður til bert fimm minuttir, tí filmurin má ikki fara eitt sekund út yvir fimm minuttir.

Eftir ætlan skal filmurin vera liðugur síðst í hesum árinum, og einaferð næsta ár verður hann vístur í sjónvarpinum - helst eisini í Sjónvarpi Føroya. Og leikstjórin væntar haraftur-at at filmurin fer út í Evropa at ferðast og luttaka á ymsum filmsstevnum.

Tá ið Katrin Ottarsdóttir er liðug við Regin smið, fer hon í gongd við næstu filmsætlanina. Tann filmin er ætlanin at gera í Føroyum, sigur Hugin Eide, sum er farin í gond við tunga arbeiðið at finna fígging.



# Ljómur á ljómfløgu




*Kirkjukórið Ljómur í Vági hevur givið út fløgu, ið fæst kring landið mánadagin. Við allahalgannakonsertina í Vágs Kirkju sunnudagin verður fløgan alment løgd fram*

**Kirkjukórið Ljómur í Vági hevur í longri tíð arbeitt við eini fløguætlan og nú er fløgan veruleiki. Kórið hevur allahalgannakonsert sunnudagin í Vágs kirkju, og við høvið verður fløgan løgd fram og mánadagin er hon á handils-hillunum kring landið**

KÓRTÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Kórfløgur síggjast ikki á hvørjun degi á føroyska partinum av handilshillunum, men nú er lagt afturat. Eitt av gomlu og høgt mettu kórunum hevur í fleiri ár arbeitt miðvíst og hart við fløguætlan, sum nú er veruleiki. Talan er um Kirkjukórið Ljóm úr Vági, sum nú er at hoyra á fløgu.

Talan er um eina stóra og kostnaðarmikla ætlan, sum nú er veruleiki. 18 sangir eru á fløguni. Tað er kendi týski kórleiðarin Johannes Rahe, sum leiðir kórið undir upptøkunum, meðan Hans Pauli Tórgarð og Dorte Tilma hava staðið fyri kórvenjingini. Matti Heinonen hevur tikið upp og honum til hjálpar hava Johannes Rahe og Rúni Brattaberg verið. Kirkjukórið Ljómur stendur fyri fløguni og Karin Brattaberg hevur leitt framleiðsluna. Upptøkurnar eru farnar fram í Vágs kirkju í 2001 og 2002.

Tað var Edith Dahl, sum í 1939 stovnaði Ljóm og hon leiddi kórið í 21 ár. Onnur, ið hava stjórnað eru t.d. Jóannes Nolsøe, H.P. Tórgarð, Ólavur Hátún, Dorte Tilma og Claus Telling. Ljómur er lítið, men søguríkt og dugnaligt kór, og hjá so lítlum flokki er tungt at fara undir stóra og kostnaðarmikla fløguætlan, men á fløguni sæst, at mangir eru stuðlarnir, sum hava gjørt sítt til, at fløgan er veruleiki.

Fløguhúsin er ein listarlig perla. Kendi danin Per Folkver hevur tikið myndirnar og Maarbjerg Grafisk Design hevur staðið fyri at greiða til prent. Í snøgga húsanum er hefti við myndum, upplýsandi teksti og sangtekstum.

Tey 18 løgini eru kend løg fyri tað mesta og eisini Nú Hvítna Tindar er við. Eitt lag, sum fyrstu ferð varð sungið í Vágs kirkju og sum Robert Joensen umyrkti. Lagið er fastur táttur við allahalganna-konsertirnar hjá Ljómi. Í ár verður konsertin sunnudagin kl. 17 í Vágs kirkjunakað seinkað, tí bíðað varð eftir fløguni - og við konsertina verður fløgan alment løgt fram. Nýggja fløgan við Ljómi verður at fáa kring alt landið mánadagin.

